## HANDILSLÆRLINGUR TIL THOMAS DAM ÍTRÓTT Í HAVN

Søkt verður eftir lærlingi til ítróttarhandil okkara í Havn at byrja skjótast tilber.
Starvið er fjølbroytt, spennandi og áhugavert fyri tann i dámar væl at umgangast viðskiftafólk.
Tað er eisini møguleiki fyri at luttaka á ítróttarmessu í Danmark.

Lærutíðin við HH er 2 ár, og vi FHS 3 ár. Í hesum tíðarskeiðnum skal næmingurin á skúla í Danmark 3 ferðir.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki bangin fyri at taka eina eyka hond í tá á stendur.

Um tú ert tann rætti kunnu vit bjóða tær eina spennandi lærutíð við nógvum avbjóðingum, samstundis sum møguleiki er fyri at halda fram í fyritøkuni eftir lokna lærutíð.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til:

P/f Thomas Dam Ítróttur
Postmoga 268
FO-110 Tórshavn

Sosialurin 341800

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR · NIELS FINSENSGØTA 5
POSTSMOGA 268 · 110 TÓRSHAVN · TEL 35 53 00



## KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

### søkir skrivstovulærling

Vit kunnu bjóða eitt læruplás til allar uppgávur í eini fyrisiting. Vanliga arbeiðið umfatar millum annað debitor- og kreditorbókhald, tolling, postavgreiðslu, keypfakturering og annars allar tær vanligu uppgávurnar í eini sera dynamiskari fyritøku.

Umsøkjarir skulu hava FHS-prógv ella líknandi miðnámsútbúgving.

Spurningar um starvið kunnu setast Jóhannes Hansen, fíggjarleiðara, á tel. 588815, ella á telduposti jh@kj.fo.

Skriftlig umsøkn, saman við viðkomandi skjølum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. august 2006.

Send umsøknina til:

KJ Hydraulik PF
Postboks 110
FO 530 Kambsdalur,
ella við telduposti til jh@kj.fo

*KJ er ein fyritøka við serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni. Fyritøkan veitir og serviserar útgerð til fiskiídnaðin, alivinnuídnaðin á sjógvi og landi, umframt flutningsvinnuna og byggivinnua. Sum ein av stóru fyritøkunum á maskintekniska øki í Føroyum, veitir KJ eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og Noreg. Í løtuni starvast umleið 60 fólk á deildum okkara á Kambsdali og í Tórshavn.*



# Nýggi Dagstovnurin í Sørvági

### søkir eftir einum stuðulsfólki

Starvið snýr seg um eitt barn við fysiskum breki.

**Uppgávurnar eru m.a. at :**
- vera um og stimbra barnið í samspæl við onnur børn á stovninum
- stimbra fysisku førleikarnir hjá barninum
- fara við barninum til venjingar/fysioterapi o.a.

**Arbeiðstíðin:**
Er 40 tímar um vikuna. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar, ið hava útbúgving sum pedagogar og starvsfólk við líknandi royndum hava fyrimun til starvið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Gitta av Kák leiðara á dagstovninum

**Løn og setanartreytir:**
Sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Í lønarflokki 3 til 8 fyri hjálparfólk og 11 til 18 fyri pedagogar.

Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast innan 15 august 2006 til :

**Nýggi Dagstovnurin**
**í Sørvági**
Att: Gitta av Kák
Varðagøta 8
Fo-380 Sørvágur
Viðmerkjast skal :
»umsókn til stuðul«



# Starvsfólk

Vegna økt virksemi søkja vit eftir starvsfólki

Vit søkja eftir:
- Handilslærning (til handil)
- Lagurmann (til lagur og útkoyring)
- Snikkara/timburmann e.l. (til uppsetan og samling av køkum)

Løn og arbeiðistíðir eftir avtalu

**Kvik Køkssentrið**
Hoyvíksvegur 65 · 100 Tórshavn
tel. 312480 · fax 319718

kvik

Kvik Køkar er ein fyritøka, ið varð stovnað í 1991. Vit selja køkar, baðirúm, klædnaskáp, hvítvørur og tilhoyr. Eisini hava vit eina deild við gávulutum og brúkslist



**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

## Vinnumálaráðið søkir eftir fulltrúa

Fyri løgfrøðing í farloyvi søkir Vinnumálaráðið eftir løgfrøðingi frá 1. september 2006 og 12 mánaðir fram við møguleika fyri føstum starvi.

**Arbeiðið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At veita landsstýrismanninum og stjóranum løgfrøðiliga ráðgeving
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv (cand.jur.). Umsøkjarar, ið hava staðið bachelor útbúgving í løgfrøði, eru eisini vælkomnir at søkja.

Umsøkjarar við viðkomandi royndum hava fyrimun.

Harumframt skulu umsøkjarar duga føroyskt og enskt væl og hava kunnleika til EDV.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir Vinnumálaráðnum, umframt onnur stjórnarráð.

Umsókn, saman við prógvum, CV, viðmælum o.ø., skal verða send til

**Vinnumálaráðið**
**Postsmoga 377**
**110 Tórshavn**

Freistin at søkja er ***fríggjadagin 18. august 2006.***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, stjóra, tlf. 356070.



# Summar tilboð

Nú er tíð at taka bátin upp á land
til botnreinsan

Vit fara nú sum nakað nýtt at taka bátar upp á Toftum. Møguleiki verður at hava atgongd til trýstreinsara.

Prísdømi 28 Fót 500,- V/MVG
Upp og niður Eingin bíðitíð

Møguleiki er eisini at gera botnsýn

Um hetta hevur tygara áhuga, so ring

**447474 ella 225105**

eisini kan sigast frá á e-mail
*sdbeding@post.olivant.fo*

**SD-BEDING**
Góðkendur glastrevjaverkstaður



# Ítróttarsosialurin
## – vit eru har tað hendir

